## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 14 stig. Seint um kvøldið møguliga regn.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og fyrrapartin regn, men seinnapartin sólglottar, tó mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsyningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Sunnukvøldið møguliga regn. Hitin millum 12 og 16 stig.

# Uttan fisk, býr einki fólk í Føroyum

**Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, setti 19. ársfundin hjá NASCO, sum í hesum døgum verður hildin í Føroyum.**

LAKSAUMSITING
*Vilmund Jacobsen*

Í hesi vikuni heldur laksafelagsskapurin, NASCO, sín 19. ársfund í Føroyum. NASCO-felagsskapurin, sum er stovnaður í 1984, hevur til endamáls at varðveita og fyrisita laksastovnarnar í Norðuratlantshavi. Limalondini í felagsskapinum eru Kanada, Danmark (vegna Føroyar og Grønland), ES, Ísland, Noreg, Russland og USA.

Tað var Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, sum setti ársfundin hesaferð.

Hann vísti á, at vit føroyingar liva av tí, sum havið gevur, og tí er tað so umráðandi fyri okkum, at skipað verður soleiðis fyri, at vit fáa sum mest burtur úr tilfeinginum í havinum.

– Fiskur kennir eingi landamørk, og tí er so umráðandi við felagsskapum sum NASCO, ið hava sum mál at varðveita og fyrisita laksastovnin.

Í setanarrøðuni samanbar Jørgen fiskiskap við fótbólt, sum øll tosa so nógv um í hesum døgum.

– Venjarin kann ikki avgera úrslitið; hann kann bara royna at »kontrollera« spælararnar. Tað sama er við náttúruni og fiskiskapi. Vit kunnu ikki »kontrollera« náttúruna, men vit kunnu ansa eftir teimum menniskjum, sum veiða fiskin.

Jørgen Niclasen vísti á, hvussu umráðandi tað er hjá okkum føroyingum at hava rættin til at veiða laks burðardygt á opnum havi, tí sum hann tók til:

– Uttan fisk, býr einki fólk í Føroyum.



*Jørgen Niclasen setir NASCO-ársfundin: – Uttan fisk, býr einki fólk í Føroyum. Tí er umráðandi, at vit eisini eiga rættin til burðardygt at veiða laks á opnum havi*



*NASCO-ársfundur er hesa vikuna í Føroyum. Fundurin endar 7. juni*

### Áseta kvotur og veiðireglur

NASCO-felagsskapurin fevnir um eitt ráð, tríggjar økisnevndir og eina skrivstovu. Økisnevndirnar eru: Norðuramerikanska Nevndin, Nevndin fyri Landnyrðingspartin av Atlantshavi og Vesturgrønlendska Nevndin.

Føroyar eru limir í Nevndini fyri Landnyrðingspartin av Atlantshavi, sum ásetir kvotur og veiðireglur fyri laksafiskiskapi á opnum havi. Umframt Føroyar, eru ES, Ísland, Noreg og Russland limir í hesi nevndini.

19. ársfundurin hjá NASCO endar 7. juni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | 14 |
| Halifax | 13 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 25 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 21 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 994 hPa við Skotland fer í landsynning og dýpist. Brúgvalagið haðani til Føroya fer norðureftir.




Lágtrýstið yvir sunnara Norðsjógvin fer spakuliga í útnyrðing og hitabrúgvin haðani fer um Føroyar hósnáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/06 kl. 06⁰⁰– 04/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,8°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 03/06 kl. 06⁰⁰– 04/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 21,9 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

3. juni: Seinna kvarter
4. juni: Mánin longst frá jørðini
10. juni: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| | Suðuroyar—/ Vágafirði | | Skúvoyar—/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna—sundi | | Mykines—firði | | Nólsoyar—firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði | | Hvanna—sundi | | Fugloyar—firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 5. juni | 03.42 | 16.00 | 02.42 | 15.00 | 02.57 | 15.15 | 05.42 | 18.00 | 06.42 | 19.00 | 01.57 | 14.15 | 00.57 | 13.15 | 03.57 | 16.15 | 04.57 | 17.15 | 03.27 | 15.45 | 04.42 | 17.00 |
| 6. juni | 04.17 | 16.34 | 03.17 | 15.34 | 03.32 | 15.49 | 06.17 | 18.34 | 07.17 | 19.34 | 02.32 | 14.49 | 01.32 | 13.49 | 04.32 | 16.49 | 05.32 | 17.49 | 04.02 | 16.19 | 05.17 | 17.34 |
| 7. juni | 04.52 | 17.10 | 03.52 | 16.10 | 04.07 | 16.25 | 06.52 | 19.10 | 07.52 | 20.10 | 03.07 | 15.25 | 02.07 | 14.25 | 05.07 | 17.25 | 06.07 | 18.25 | 04.37 | 16.55 | 05.52 | 18.10 |
| 8. juni | 05.29 | 17.48 | 04.29 | 16.48 | 04.44 | 17.03 | 07.29 | 19.48 | 08.29 | 20.48 | 03.44 | 16.03 | 02.44 | 15.03 | 05.44 | 18.03 | 06.44 | 19.03 | 05.14 | 17.33 | 06.29 | 18.48 |

5 707265 100036 >